FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Løgtingið
(Trivnaðarnevndin)
Tinghúsvegur 1-3
FO 100 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 19.10.2023
J. nr. (MEGD): 701-7-2023
Ummælistíð: Ikki sent til hoyringar
J. nr (HMR): 23/18533-21

Hoyringarskriv viðvíkjandi

Løgtingslóg (LM-025/2023) um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin)

(Heilivágsstigin verður broyttur)

Uppskotið hjá Heilsumálaráðnum er eitt sparitiltak, sum fer at merkja, at heiluvágurin hjá fleiri bólkum fer at dýrka. Hjá fólki millum 18 og ár og pensjónsaldur fer egingjaldið til heilvág – tað er hámarksgjaldið – at hækka 100 kr. um mánaðin og hjá pensjonistum og fyritíðarpensjonistum 66 kr.

Hjá fyrrnevnda bólki merkir broytingin, at hjá teimum við størstu útreiðslunum til heilivág fer egingjaldið at hækka úr 2.377 kr. upp í 3.775 kr. um ári, so at tað nú verður knappar 300 kr. um mánaðin. Hjá pensjonistum og fyritíðarpensjonistum hækkar egingjaldið úr 1.520 kr. upp í 2.320 kr. og verður nú 193 kr. um mánaðin fyri tey við størstu útreiðslunum.

Steinur omaná byrðu

MEGD harmast um uppskotið og mælir frá, at broytingin verður gjørd. Bæði umstøður í samfelagnum, í okkara lóggávu og altjóða sáttmálum, vit hava bundið okkum til, tala ímóti eini slíkari broyting, sum verður eitt bakkast fyri fólk við breki.

Uppskotið fer at gera, at heiluvágur, sum er lívsneyðugur og sum longu nú er dýrur, dýrkar enn meira. Samfelagið alt hevur verið rakt av methøgum príshækkingum seinastu árini, sum fólk við breki eisini hava merkt sviðan av. Verður hetta uppskotið samtykt, fer tað tó at merkja, at summi føroyingar, aftruat øllum hinum, fara at fáa ávíkavist 200 kr. og 300 krónur í føstum

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

útreiðslum til heilivág um mánaðin, omaná. Hetta er tó ikki alt, tí samstundis er boðað frá øðrum inntrivum, sum fara at dýrka gerandisdagin hjá nógvum fólkum við breki. Løgtingið viðgerð í løtuni eitt uppskot, um at strika arbeiðsbúgvingarstuðulin í lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk (LM-023/2023), sum fer at skerja samlaða stuðulin til fólk við breki við meira enn eini helvt, og Almannaverkið hevur samstundis boðað frá, at húsaleigan hjá teimum, ið leiga frá AV, hækkar á nýggjárinum við upp til 20 %.

Alt í alt fer hetta uppskotið at virka rættuliga tyngjandi fyri hendan bólk av samfelagsborgarum, sum frammaundan hevur stórar avbjóðingar, og t.d. ikki hevur nær námind somu møguleikar fyri lønarinntøku sum onnur.

Hetta kemur tí sum steinur omaná byrðu, og fer at rakar lutfalsliga hart.

Heilsutrygdarlógin: Fíggjarligt atlit

Uppskotið tykist eisini liggja rættuliga langt burtur frá tí, sum uppunaliga var ætlanin við heilsutrygdarlógini.[1] Tá lógin kom var mesta egingjaldið hjá teimum millum 18 og 67 lutfalsiga lágt, 1.600 kr. Hesi 13 árini síðani lógin kom í gildi, er egingjaldið hjá teimum, ið rinda mest fyri heilivág, sostatt hækkað við ikki minni enn 2.172 krónum (3.775-1600 kr.). Hetta svarar til eina hækking á meiri enn 230 %, verður hetta lógaruppskotið lagt til grund.

Í almennu lógarviðmerkingunum til heilsutrygdarlógina stendur annars sum grundgevingin fyri endamálið við at at áseta eitt hámark (egingjald) fyri heilivágsútreiðslurnar hjá fólki (við okkara undirstriking), at:

> Grundreglan handan hesar broytingar er tann, at tað ikki eigur at verða ein fíggjarligur smeitur fyri tey, sum vegna sjúku hava tørv á nógvum ella kostnaðarmiklum heilivági.

Vísandi til omanfyrinevndu umstøður metir MEGD, at nógv hækkaða egingjaldið – og hækkingin, sum nú er fráboðað – ganga ímóti uppruna endamálinum við lógini, við tað, at egingjaldið er blivið so høgt, at tað er vorðið eitt munandi inntriv í privata húsarhaldi hjá fólki, sum bera brek.

[1] sbr. Løgtingsmál nr. 72/2009: Uppskot til løgtingslóg um almenna heilsutrygd (heilsutruygdarlógin). https://www.logting.fo/mal/mal/?id=5337

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Altjóða skyldur

a)Javnbjóðis atgongd til heilsutænastur

Føroyar hava við løgtingsamtykt bundið seg til altjóða sáttmálar, sum hetta lógaruppskot kann gera seg inn á. Smbrt. grein 25 í Brekrættindasáttmálanum hjá ST hava londini bundið seg til, við hóskandi tiltøkum, at tryggja fólki við breki javnbjóðis atgongd til heilsutænastur, herundir (við okkara undirstriking):

> Provide persons with disabilities with the same range, quality and standard of **free or affordable health care and programmes** as provided to other persons (…)(sbr. grein 25 (b))

Viðvíkjandi atgongd til heilsutryggingar sigur grein 25 eisini, at londini skulu:

> Prohibit discrimination against persons with disabilities in the provision of health insurance, and life insurance where such insurance is permitted by national law, which shall be provided in a **fair and reasonable manner**; (sbr. grein 25 (e))

Merkingin av grein 25 skal eittnú lesast saman við grein 12 um heilsutænastur í ST-sáttmálanum um búskaparlig, sosial og metanarlig rættindi[2], sum Føroyar eisini hava bundið seg til. ST-nevndin, ið situr fyri hesum sáttmála, hevur nevniliga úttalað seg soleiðis um tað *figgjarliga aspektið* viðvíkjandi javnbjóðis atgongdini hjá borgarunum til heilsutænastur (við okkara undirstriking):

> Economic accessibility (affordability): health facilities, goods and services must be affordable for all. Payment for health-care services, as well as services related to the underlying determinants of health, has to be based on the principle of equity, ensuring that these services, whether privately or publicly provided, **are affordable for all, including socially disadvantaged groups. Equity demands that poorer households should not be disproportionately burdened with health expenses as compared to richer households**;[3]

[2] https://logir.fo/Bekendtgorelse/5-af-14-01-1976-af-international-konvention-af-16-december-1966-om-okonomiske-sociale-og

[3] CESCR General Comment No. 14: The Right to the Highest Attainable Standard of Health (Art. 12), reglubrot 12 (b). https://www.refworld.org/pdfid/4538838d0.pdf

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Flutt yvir á Brekrættindasáttmálan verður hetta borið fram soleiðis:

> Building on the articulation of the right to health in ICESCR General Comment 14, the right to health requires (…) **economically accessible or affordable services**.[4]

Hóast stigaskipanin í heilsutrygdarskipanini byggir á samhaldsfesti, við tað at tey, sum hava størstu útreiðslurnar fáa lutfalsiga størri ískoyti, so tekur skipanin tó ikki fyrilit fyri, at summir samfelagsbólkar, so sum fólk við breki, kunnu vera verri fyri fíggjarliga, og tískil verða lutfalsliga harðari rakt av høgum og støðugt hækkandi egingjøldunum til heilivág.

Vísandi til omanfyrinevna, kann tí ikki útilokast, at eitt uppskot um at hækka egingjaldið eisini gongur ímóti omanfyrinevndu ásetingum í altjóða rætti og kravinum um at heilutænastur skulu vera *affordable* og *fair and reasonable*.

b) Stigvaksandi skipan

Til endans kann lógaruppskotið møguliga vera í ósamsvari við grein 4(2) í Brekrættindasáttmálanum. Heilsutænastur og tryggingar eru rættindi, sum vera flokkað undir bólkin av fíggjarligum, mentanarligum og sosialum rættindum – og sum londini vanliga hava skyldu at fremja við støði í grein 4(2) í sáttmálanum, ið ásetur eitt krav um, at talan skal vera um eina *progressiva* (stigvaksandi/stigvísa) *realisering* av sáttmálarættindunum.

Tað er m.a. í sambandi við grein 4(2), at ST hevur kravt, at londini hava eina nationala virkisætlan, sum við støði í ítøkiligum langtíðar ætlanum stingur út í kortið hvussu londini fara at útinna og menna rættindi í verki – í hesum føri dyggar og atgeingiligar heilsutænastur.

Við nevnda uppskotið leggur løgtingið við lóggávu lutfalsliga stórar og støðugt vaksandi byrðar á fólk við breki, sum hava lívsneyðugan heilivág fyri neyðini. Nevndi samfelagsbólkur hevur harumframt alt ov ofta skerdar vinnumøguleikar, og hevur tí rætt til tillagaðar karmar og skipanir, ið rætta upp mismunin fyri viðkomandi brek ella

[4] The UN Convention on the Right of Persons with Dissabilities. A commentary: Bantekas, Stein og Anastasiou, 2028. Við tilvísing til CRPD, 'General Comment 2) (2024) Article 9: Acessability' UN Doc DRPD/CGC/2(22 May 1014

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

varandi sjúkur. Uttan eina langtíðar ætlan fyri hendan samfelagsbólk, er ikki møguleiki fyri at tryggja eina stigvaksandi realisering av eitt nú rættinum til heilsutænastur eftir grein 25.

Í hesum føri er heldur talan um eitt tiltak, sum virkar beint tvørturímóti og er eitt afturstig fyri fólk við breki. Eitt stig, sum haraftruat kann tyngja teirra avvarðandi fíggjarliga.

Vísandi til omanfyrinevnda fara vit at mæla løgtinginum frá, at taka undir við løgtingsuppskotinum.

Vinarliga

MEGD

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo